**Broytingar í byggisamtyktini fyri Vestmanna kommunu**

| | |
|---|---|
| *IMR mál nr.:* | **1828-006/08** |
| *BN mál nr.:* | **US-34-027/09** |

*Lýsing av málinum:*

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

20. APR. 2009

J. nr. 1828-006/08-8

- Striking av havnarøki á Grønanesi
- Víðkan av havnarøki á Heyganesi og við nýggja havnarlagið
- Alment frítíðarøki Úti á Toft
- Alment frítíðarøki í Flatabø
- Striking av øki til almennar stovnar í Vestri og tilsvarandi víðkan av sethúsaøki
- Víðkan av vinnuøki við Hornaveg
- Alment frítíðarøki rundan um hylin innanfyri nýggja havnarlagið
- Broytingar og tillagingar av miðstaðar- og havnarøki Undir Holmabakka
- Víðkan av frílendinum omanfyri skúlan í Frammbø
- Broyting av ætlaðum vegi og sethúsaøkjum omanfyri Rógvu
- Burturtøka av ætlaðum gongugøtum í Garðastovubønum og ímillum Gerðisveg og Rógvuveg
- Nýtt parkeringsøki í Garðastovubønum
- Broyting av sethúsaøkjum og víðkan av frílendum á Fitjum
- Broyting av ætlaðum vegi til sethúsaøki ímillum Leitisveg og Ovara Veg víðkan av sethúsaøki við Leitisveg
- Nýggj økir til frítíðar- og summarhús, húsvognar og tjalding uttanfyri Fossá ímillum Ovara Veg og Niðara Veg og á økinum niðanfyri landsvegin Inni á Fjørð
- Harafturat eru fleiri tillagingar gjørdar í bygdarskipanini, so økismark og matrikulmark falla saman.

Byggisamtyktin - økisásetingarnar og byggifyriskipandi reglurnar - eru víðkaðar og dagførdar.

| | |
|---|---|
| ***Samtykt:*** | 26.08.2008 |
| ***Framløga:*** | 03. - 24.09.2008 |
| ***Mótmæli:*** | Tríggjar kærur og tvey broytingaruppskot. |
| ***Viðmerkingar:*** | Í stórum heldur kommunan fast við framlagda uppskotið, men ger tó onkrar reguleringar í mun til innkomnu viðmerkingarnar. |
| ***Endaliga samtykt:*** | 16.12.2008 |
| ***Sent IMR til góðkenningar:*** | 17.12.2008 |
| ***Sent nevndini til ummælis:*** | 16.01.2009 |

Nevndin hevur viðgjørt málið og m.a. verið á fund við umboð fyri kommununa í Vestmanna 10. mars í ár. Har hitti nevndin borgarstjóran **Karl A. Olsen,** formannin í teknisku nevnd **Paula T. Petersen** og tekniska leiðaran **Jákup Durhuus**.

Teir greiddu frá, at talan í stóran mun er um dagføringar av økisskipanini og ásetingunum.

**Býarskipanarnevndin,** postsmoga 2048, 165 Argir - *tlf:* 342424 / 287046, *t-postur:* PeturN@us.fo

Nýtt er, at øki verða løgd út til frítíðar- og ferðavinnu uttan fyri Fossá og niðan fyri landsvegin inni á Fjørð. Ferðavinnan annars, sum vestmenningar skipað fyri, er ikki viðgjørd í planinum.

Tað er ætlanin at snøgga økið fram við bátahylinum og gera hetta til eitt aktivt savningarstað í bygdini. Tí er ein rond við heitinum "alment frítíðarøki" løgd har. Bygdarsavnið, sum er í umbúnað, skal hava tilknýti til hetta frítíðarøkið.

Kommunan hevur 8 tøk grundstykki og eini 25 afturat eru, sum ikki eru ikki byggibúgvin. Eingin "privat" grundstykki eru tøk í bygdini, men eftir uppskotinum verða slík sethúsaøki løgd innan fyri Fossá - oman fyri ovara veg - og fram við Leitisvegi.

Undir Holmabakka verða ásetingarnar broyttar, so økið kann brúkast til miðstaða- og/ella havnaendamál, alt eftir um talan eru um veghædd (móti Bakkavegi), miðhædd ella niðastu hædd móti havnalagnum.

Víst verður annars til lýsingina av broytingunum omanfyri.

Eftir fundin fór nevndin saman við Jákupi um bygdina.

Nevndin hevur hesar viðmerkingar:

Tað eru gjørdar fleiri dagføringar og ískoyti í tekstskjalinu, serliga viðvíkjandi umsitingarligu fyriskipanunum. Men eisini í økisásetingunum eru broytingar, og tveir nýggir økispartar síggja dagsins ljós: Eitt blandað miðstaðar- og havnaøki (A og D), og so øki K til summarhús, frítíðarhús, húsvognar og tjalding.

Annars er mest talan um broyttar karmar viðvíkjandi hædd á bygningum, byggistigi vm.

Nevndin tók upp spurningin um, hvørt og hvussu konstruktiónir av ymsu slag - flytiligar sum fastar, fyribils sum permanentar - skulu viðgerast sum byggimál. Vestmanna kommuna viðger slíkar spurningar í § 2 stk. 2 í byggisamtyktini. Bingjur og vindmyllur vórðu havdar á lofti. Niðurstøðan var, at reglurnar hjá kommununi eru ílagi, og at praksis kann verða royndur í kærunevndini, um ivi stendst av handfaringini.

Í grein 8 um kærur eigur í staðin fyri orðingina í 3. petti *fyriskipan, ið byggivaldið hevur givið* at verða sett *avgerð, ið byggivaldið hevur tikið.*

Nevndin heldur, at orðingin *í serstøkum førum er loyvt at innrætta íbúð*, sum nýtt verður í grein 10.1, 12.1 og 14.1, er ógreið. Hvørji serstøk viðurskifti skulu vera galdandi, áðrenn loyvt er at gera íbúðir á økjunum ? Antin er loyvt at innrætta íbúðir í tilknýti til virkisbygningar á hesum økjum, ella eisini er tað ikki. Hetta sjálvandi treytað av, at viðurskiftini annars eru í lagi.

Gistingarhús, matstovur og smærri handverksfyritøkur eru skoytt upp í listan av funktiónum, sum kunnu vera á miðstaðaøki. Tað síðsta av hesum er ikki vanligt, men helst er hetta í lagi.

Viðvíkjandi nýggja økispartinum K tykir tað nevndini, at bæði ásetingarnar og økini, ið hava fingið hesa átekning, bera týðilig boð um, at hugsað verður um frítíðarvinnu, og tí fløkir tað málið, at summarhús, eru tikin við. Nevndin fer at mæla til, at vanligu summarhúsini (tað vit vanliga skilja við summarhús) verða tikin burtur úr hesum ásetingum, og har aftur at at disponering og bygging á hesum økjum bert kann fremjast sambært góðkendari serstakari byggisamtykt. Hetta, so tryggjast kann, at tað, sum gjørt verður á hesum serstøku økjunum, er so væl skipað sum gjørligt.

Nevndin er ivasom viðvíkjandi teimum víðkaðu sethúsaøkjunum innan fyri Fossá og fram við Leitisvegi. Hitt fyrra sýnist sera torført at byggja út, tí har eru so bratt. Men um ein ítøkilig ætlan verður gjørd, sum vísir at hetta ber til, fer nevndin ikki at seta seg ímóti hesum. Náttúrufriðingarmyndugleikarnir skulu tó spyrjast, áðrenn sett verður á.

Nevndin hevur áður viðgjørt uppskot um bygging inni á Leiti, og hevur tá mælt frá. Víst varð til bøin, trupla vegføring og nærleikan til ánna Heljareyga sum grundir fyri ikki at byggja har. Nevndin heldur seg framvegis til hesa argumentatión, og fer at mæla frá, at nýggju grundstykkini fram við Leitisvegi verða góðkend.

Nevndin fer somuleiðis at mæla frá, at ætlaði útstykkingarvegurin oman frá Leitisvegi verður gjørdur.

Annars tekur nevndin undir við broytingunum í økisskipanini, og kommunan hevur rós uppiborið fyri dygdargott og greitt plantilfar.

**Býarskipanarnevndin, 16. apríl 2009**

Sverri Fram Svenne ..........................., formaður ..........................................., skrivari